# Fornfrøðiligu rannsóknirnar halda fram



**Rannsóknin inni í nýggja partinum av kirkjugarðinum heima á Sandi, sum farin varð undir seinasta summar, varð tikin upp aftur mánadagin. Rannsóknin verður gjørd fyri at fáa til vega pláss til at jarða lík í**

TÍÐINDASKRIV

Neyðugt er at kanna nýggjara partin av kirkjugarðinum fornfrøðiliga av tí at kanningar áður hava staðfest, at í lendinum finnast leivdir eftir fornari búseting. Sambært fornminnalóggávuni eru slíkar leivdir friðaðar. Tískil mugu leivdirnar staðfestast og kannast, áðrenn tær verða loystar úr friðing.

Lendið, farið varð undir at kannað seinasta summar, er upp á umleið 80 m², og arbeitt verður aftur í ár í fýra vikur – í tíðarskeiðinum 22. juni til 20. juli.

Fornfrøðiliga er lendið sera áhugavert. Rannsóknir í 1970- og 80-árunum hava staðfest, at búleikast hevur verið í hesum víðfevnda lendi síðan einaferð í víkingaøld og fram til uml 11-1200-árini. Umframt at leivdir eru funnar av bygningum, so sum gólvum, veggjum, eldstøðum og ymiskum steinsetingum, eru eisini funnar leivdir eftir ymiskum virksemi, eitt nú jarnsmið. Serliga áhugavert var í 1989 tá 12 gravir komu undan kavi. Tey deyðu vóru jarðað við ymiskum lutum – so sum armbondum og hálsketum úr ymiskum litaðum perlum úr glasi, beini og rav, nøkur við silvurringum og knívum. Eitt av fólkunum hevði fingið ein arabiskan silvurmynt við sær í grøvina – ein sonevndan kufiskan mynt, ið er hin einasti, ið funnin er her í oyggjunum. Mynturin er sligin í 9. øld, og man verða komin hendan vegin einaferð í fyrru helvt av 900-árunum.

Undir rannsóknini seinasta ár varð øll moldin, ið grivin varð upp, tikin til høldar sum sýni og vatnsoldað. Tilfar so sum djórabein o.a. varð tikið til síðis, meðan tað, sum lá eftir í soldinum varð turkað. Plantuleivdir úr turkaða tilfarinum, eru í vetur kannaðar á universitetinum í Durham í Onglandi. Eitt nú er vorðið greitt, at ovurhonds rúgva av kolaðum korni er funnið í hesum tilfari, ið helst stavar frá handfaringini av at turka korn har á staðnum – í einum av bygningunum, leivdir vórðu funnar av. Hesar kanningar eru enn ikki liðnar, og vóna vit, at úrslit spyrjast innan alt ov leingi. Eisini eru sýni send til kolevnis-14 tíðarfestingar at tíðarfesta hetta virksemi. Hesi fyribilsúrslit staðfesta fatan okkara av, at tað neyvan er her, at fólk hava búð, men heldur, at her hava fólk tikist við ymisk arbeiðið og handverk.

Rannsóknarhópurin í ár, ið telur 15 fólk, eru umframt ein føroyskan fornfrøðilesandi og fornfrøðingar av Føroya Fornminnissavni, fornfrøðingar og fornfrøðilesandi frá universitetinum í Bradford í Onglandi. Sum nakað serligt í ár verður skipað fyri undirvísing fyri teimum ungu lesandi, ið tey fáa góðskrivað í sambandi við lesnað teirra. Talan er sostatt um eitt slag av feltskúla, ið vit í arbeiðið okkara ætla at útbyggja og menna framyvir.

Tað er Føroya Fornminnissavn, ið fyriskipar rannsóknini. Arbeiðið verður gjørt sum liður í altjóða verkætlanini "Heart of the Atlantic", sum seinnu árini hevur verið arbeitt við á ymiskum støðum á Sandi. Verkætlanin hevur verið fíggjað við stuðuli frá oljufeløgunum Anadarko og BP, frá amerikanksa vísindagrunninum umframt frá Granskingargrunninum í Føroyum. Í ár verður arbeiðið í høvuðsheitum fíggjað um løgtingsins fíggjarlóg, m.a. við tað, at talan er um neyðrannsókn.

Vit vilja gera vart við, at fólk eru vælkomin at vitja rannsóknina, har vit greiða áhugaðum frá arbeiðinum og tí, ið har kemur undan kavi. Eisini ber til at ringja til kunningarstovuna heima á Sandi, um tit hava onkrar spurningar rannsóknini viðvíkjandi - tlf. 361836.


SAMSKIP



## > Samskip søkir eftir formanni til frystigoymsluna í Kollafirði

**Starvslýsing:**
Sum formaður fært tú høvuðsábyrgd av øllum tí dagliga arbeiðinum á goymsluni. Tú kemur eisini at hava ábyrgd av, at skrásett verður í goymsluskipanini á fullgóðan hátt. Formaðurin syrgir í hesum sambandi eisini fyri, at mannagongdirnar framhaldandi vera mentar í HACCP, góðskuskipanini, til tess at tryggja, at heilsufrøðilig krøv og kundans ynskir verða gingin á møti.

**Starvskrøv:**
Vit vænta, at tú ert fyrikomandi, hevur góð samstarvs- og samskipanarevnir og dugir at samskifta við umhugsni – eisini tá ið harðast leikar á. Eisini vænta vit viðkomandi telduførleika og royndir.

**Seinasta freist** at søkja er 03. juli kl. 16.00.
Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og avbjóðandi starv í einum dynamiskum kappingarumhvørvi
- Eitt óformelt og virkið arbeiðsumhvørvi
- Góðar starvsfelagar og góðar arbeiðsumstøður

**Meira kunning:**
Hevur tú spurningar til starvið, ring vinarliga til Niels Madsen, deildarleiðara hjá Samskipum í Kollafirði, á tlf. 47 77 77 ella skriva til t-post niels.madsen@samskip.com

Løn sambært avtalu.

**Umsókn skal sendast til:**
Samskip P/F
Bryggjan
FO-410 Kollafjørður

ENNEMM / SÍA / NM38335

> Fyritøkan
Samskip er ein altjóða flutningsfyritøka. Fyritøkan er ein tann størsta bingjuflutningsfyritøkan í Europa og bjóðar millum annað flutning av vøru til og úr Føroyum. Í Samskip samtakinum arbeiða uml. 1.400 fólk í fleiri enn 20 londum. Samskip byrjaði í Føroyum í 2004 og er í dag ein av leiðandi feløgunum innan flutning til og úr Føroyum. Virksemið hjá Samskip verður samskipað í Kollafirði og Tórshavn. Frystigoymslan hjá Samskip í Kollafirði rúmar 7.000 tonsum. Skipini Helgafell og Arnarfell eru skrásett í FAS skipanini. Tvey skip, á 900 TEUs hvørt, og eitt skip, 1.100 TEUs eru í fastari linjusigling til og úr Føroyum.